Bilur við skaða til sølu

Merki: Toyota Hi-Ace Kassavognur (langur)
Árg.: 1998
Km.: 57.180

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Fróði Müller, sýnsmaður
Tlf. 345727
fax. 345607

At hitta mánadag - hósdag millum kl. 9.00 - 10.00
fríggjadag milum kl. 9.00 - 16.00

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA
ADC

Til sølu

Videohandil við lagri og inventari til sølu um hóskandi boð fæst.
Eisini er møguleiki at yvirtaka handilin í núverandi høli.

Bill. mrk. 8-12

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Økispedagogur
Enduruppslag

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir økispedagogi.

Dagrøktarskipanin í Tórshavnar kommunu er normerað til 300 børn, og umleið 65 dagrøktarar starvast í skipanini.

Arbeiðið fevnir m.a. um
- vegleiðing av dagrøktarmammum
- at skipa fyri ymiskum tiltøkum
- foreldrasamstarv.

Vit bjóða
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

Vit ynskja
at tú hevur royndir innan dagstovnaøkið, arbeiðir sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett 15. januar 2002 ella eftir nærri avtalu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, dagrøktarleiðara, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

Umsókn
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. januar 2002.

Um eingin skikkaður pedagogur søkir, kann starvi verða sett tíðaravmarka til umsøkjara við viðkomandi útbúgving.

SNARSKIVAN

Pedagogur
til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir 1 pedagogi til vøggustovuna á Dagstovninum á Argjum at byrja 1. februar 2002 ella eftir nærri avtalu.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvsognarstovnur. Á stovninum ganga 72 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.

Á stovninum eru fýra barnagarðsstovur og tvær vøggustovur, har tann eina barnagarðsstovan er ein serstova, har vit samskipa deyv og tunghoyrd og hoyrandi børn.

Á hvørjari stovu ganga 12 børn.

Vøggustovan hevur tætt samstarv við serstovuna, og má viðkomandi hava áhuga í hesum serøki.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum og foreldrunum, har tey kunnu trívast og mennast.

Somuleiðis, at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðariútvikling av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landstýrið.

Ynskir tú at vita meira um starvið, set teg so í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara, á tlf. 319019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 5. januar 2002.

Søkt verður eftir
Handilsfólki

Vit sóknast eftir einum handilsfólki til búnýtisdeildina á Hjalla at byrja beinanvegin. Viðkomandi skal hava áhuga í handilslívinum og vera dugnalig/ur og ágrýtin.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av viðskiftafólki, viðlíkahald av handlinum og tær dagligu bókføringarnar fyri deildina.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava nakað av royndum við telduarbeiði og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur hóskandi útbúgving og/ella royndir í handilsvinnuni.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi áðrenn mánadagin 10. des. 2001.

LITAVAL P/F

Postboks 1019
Tlf. 342500 · Fax 342503
E-mail: bav@litaval.fo
100 Tórshavn

Hølir til leigu

Ovasta- og miðhæddin í J. C. Svabosgøtu 4 (Málingahandilin) eru til leigu.

Hvør hæddin er uml. 185 m² og kann nýtast til skrivstovu o.l.

Nærri upplýsingar á tlf. 342500, Jóannes.

LITAVAL P/F

Postboks 1019
100 Tórshavn
E-mail: litaval@litaval.fo

Áhugavert jólatiltak

Leygardagin 8/12 verður

TOMBOLA
JÓLASØLA
&
KAFFISØLA

í Felagsskúlanum
á Oyrabakka kl. 16.00

Øll eru hjartaliga vælkomin

Ford Escort
til sølu

Diesel, 4 hurðar, árg. 92, koyrt 94.000 km. til sølu fyri 40.000 kr.

Tlf. 315130

KT fólk

Dátufrøðingur, verkfrøðingur, landmálari e.l.

Søkt verður eftir fólki at byrja 1. januar 2002 ella skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávur

Tann, ið settur verður, fer at taka lut í rakstri og menning av nýtsluskipanum og útbúnaði, at veita brúkarum og viðskiftafólki ráðgeving og at vera við í søluarbeiði.

Kjarnin í virki felagsins er kort- og geodátusavnið, og høvuðsuppgávan í so máta verður at endurnýggja savnið við myndakortum og við sonevnda FDS-kortinum.

Virksemið fevnir eisini um rakstur av øðrum dátuskipanum og internettænastum, og har aftur at um umsiting av net-útbúnaði og ambætarum.

Førleikakrøv

Sóknast verður eftir dátufrøðingi, verkfrøðingi ella landmátara, men onnur, sum hava hug og hegni til teld og at arbeiða við kortum og skrásetingum annars, eiga ikki at halda seg aftur.

Kunnleiki til Unix, Linux, Windows, Oracle, tekniforrit (MicroStation) og lendislýsingar (GIS) er avgjørt til fyrimuns.

Setanartreytir

Løn og setanartreytir samsvarandi førleikanum.

Umsóknir

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 17. december 2001.

Ring ella støkk inn á gólvið at frætta nærri um starvið.



FØROYA DÁTUSAVN pf
Tinghúsvegur 5, Postboks 255, 110 Tórshavn
tlf 316200, fax 316201, fax 319285
t-postur fda@fda.fo heimasíða www.fda.fo

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks deildarskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík, røkja raksturin.

Stýrið tekur sær av yvirordnaðari planlegging, stýrings-, eftirlits- og menningaruppgávum, av sambandinum við Toll- og Skattaráðið, aðalstýrið og landsstýri, og virkar sum ráðgevi hjá deildarskrivstovunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at arbeiða, eru 34 starvsfólk; harav eru 7 starvsfólk á lógardeildini.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara:

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

Fulltrúi

Søkt verður eftir einum løgfrøðingi til lógardeildina í Stýrinum at byrja 15. januar 2002 ella so skjótt til ber.

Høvuðsuppgávur hjá fulltrúanum verða:
- málsviðgerð innan lógarøkið, sum Toll- og Skattstova Føroya umsitur, herundir meirvirðisgjald, skatt, toll, og onnur avgjøld,
- at ráðgeva Toll- og Skattstovu Føroya kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan umsitingarumráði stovnsins,
- at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum og
- at gera lógaruppskot.

Førleiki
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum cand. jur. ella líknandi útbúgving og kunna arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Vit bjóða
- spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga
- flextíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

Setanartreytir
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Núverandi setanarøki er Stýrið, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um starvið
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Anju Hovgaard, deildarstjóra, á tlf. 35 26 00.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

7. januar 2002.

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postsmoga 2151
FO-165 Argir



Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

JÓLAGÁVUHUGSKOT
- stórt úrval av alskyns coverum
v.m. til NOKIA 3310/30

MARKNAÐUR

-lágir prísir
og góð tilboð

Storno
Handan á 6 · 100 Tórshavn
tel 31 44 14 · fax 31 80 45

KIWANIS



Vit selja jólatrø í N. Finsensgøtu

(millum Sjónleikarhúsið og Auto)

Opið er soleiðis:

Mán. 10. des. - frí 14. des.	kl. 15.00-18.00
Ley. 15. des.	kl. 10.00-16.00
Mán. 17. des.	kl. 14.00-18.00
Týs. 18. des. - frí 21. des.	kl. 14.00-20.00
Ley 22. des.	kl. 10.00-20.00
Sun. 23. des.	kl. 14.00-22.00

Stuðul til Kiwanis, er stuðul til tey veiku í samfelagnum